**Kvæðatilfar - Nr: 08**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. – 6. flokkur

**Uppgávuslag / heiti:** Brongladi navnorð

**Vegleiðing:**

Venjingin stimbrar næmingar til at ogna sær kvæði og málið, sum er í kvæðaskaldskapi.

Lærarin biður næmingarnar hvønn einsæris ella tveir og tveir velja sær tíggju navnorð úr einum ávísum broti í kvæðatekstinum. Síðani blanda næmingarnir bókstavirnar fyri hvørt orð sær og skriva blongladu orðini á eitt ark við eini striku undir hvørjum orðið. At enda skriva næmingurin navn sítt á arkið.

Lærarin savnar nú øll ørkini saman og býtir tey út aftur í flokkin, samstundis sum hann ansar væl eftir, at eingin situr við sínum egna arki. Næmingarnir loysa nú uppgávurnar hvør hjá øðrum. Tá uppgávan er loyst, fær eigarin hana aftur at rætta.

**Dømi:**

Uppgávan niðanfyri er eitt dømi upp á eina tílíka uppgávu í Brestis kvæðnum og kann eisini nýtast beinleiðis sum ein næmingauppgáva.

Tey 10 útvaldu orðini eru tikin beinleiðis sum tey standa í tekstinum. Tað ber eisini til at biða næmingarnar gera øll navnorðini um til óbundi eintal, áðrenn bókstavirnir verða blandaðir. Tey eru úr ørindi 1 – 10:

skálan – skorar – tanga – bjargalínur – svørð – loftskútar – øsku - bragdarhugin – rengur – høvdingar.

Kalnás – orrask – agnat – rulínbjgara – rðøvs – sktúarlfot – skøu – ginhudargarb – urgenr – argindvhø